# Á konsertferð til Perth í Avstraliu



MUSIKSKÚLIN Í VÁGUM

Í døgunum 27. juni til 15. juli 2005 er Ungdómsorkestrið hjá Musikskúlanum í Vágum á konsertferð í Perth í Avstraliu. Ferðin er fingin í lag av Martin Pollard, leiðara fyri Musikskúlan, gjøgnum hansara tónleikaliga samstarv í Perth. Martin Pollard er nevniliga ein avhildin konsertpianistur í Avstraliu.

Orkestrið er eitt harmoniorkestur mannað við ungum í aldrinum frá 12 til 21 ár. Leiðari hjá orkestrinum er Steven R. Foggin, tónleikalærari. Harumframt hava Eirikur Skála og Joan Joensen, tónleikalærarar hjálpt til við venjingini.

Á ferðini verða hildnar 8 konsertir ymsastaðni í Perth og Fremantle.

Orkestrið hevur vant miðvíst í eitt ár til ferðina, og leygardagin 25. juni var fráfaringarkonsert hildin í aulini í Skúlanum á Giljanesi. At stórt tónleikaligt arbeiðið er lagt í fyrireikingarnar til hesa ferð, fingu áhoyrarnir staðfest á konsertini leygardagin. Ein sera góð konsert við fjølbroyttari skrá.

At fara eina slíka ferð krevur rættuliga fitt av fyrireikingum, og er ferðin eisini rættuliga kostnaðarmikil. Fleiri tiltøk hava verið hildin fyri at savna pening inn til ferðina.

Ungdómsorkestrið og fyrireikararnir ynskja at takka øllum, sum hava stuðlað orkestrinum bæði peningaliga og á annan hátt.




Sansir søkja fyriskipara

# Fá skil á mongu træðrirnar

Sansir søkja eftir einum væl skipaðum fyriskipara.

Uppgávan fevnir um at leggja arbeiði til rættis innanhýsis, at betra um arbeiðsgongdir og at tryggja, at arbeiðsorkan verður gagnnýtt so væl sum gjørligt í húsinum. Tað hevur m.a. við sær at gera hagtøl fyri tímanýtslu og eftirkalkulatiónir.

Samstundis skal fyriskiparin røkja samstarvið við okkara veitarar, fáa tilboð til vega og tryggja okkum, at arbeiðini eru í lagi og verða veitt rættstundis.

Á Sansum starvast í løtuni 18 fólk. Vit eru eitt samskiftis- og tøknihús, ið leggur stóran dent á at kenna okkara samstarvsfelagar væl, so kunningin og marknaðarføringin samsvara við teirra samleika.

Tú verður ein lyklapersónur í fyritøkuni, sum er nógv vaksin eftir stuttari tíð. Tú heldur skil á teimum mongu træðrunum og syrgir fyri, at arbeiði verða gjørd skynsamt og úrslitagott.

Tú hevur hægri útbúgving ella royndir á økinum.

Tað snýr seg um logistikk og samskifti. Tú stýrir arbeiðsgongdunum og dugir væl at tosa við fólk við tí fyri eyga at tæna heildini, so eitt gott úrslit fæst burturúr.

Er tað ein fragd at fáa tingini at virka? Send so eina umsókn við viðkomandi skjølum til:

Sansir
Att: Høgni Rasmussen
Tinghúsvegur 47
Postboks 1099
FO-110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi innan 1. august 2005. Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at skriva til Høgna á hognir@sansir.fo ella ringja 355 355.

SANSIR

Postboks 1099, FO 110 Tórshavn, tel 355 355, faks 355 350, www.sansir.fo, info@sansir.fo


Hoydal:

## Verður ferðaavgjaldið hækkað við 30 prosentum?

Høgni Hoydal, fólkatingsmaður, hevur sett skrivligan fyrispurning til danska ferðslumálaráðharran, um hvørt ætlanin er at hækka ferðaavgjøldini um flogvøllin í Vágum við 30 % í summar.

Verður hetta framt, so er nærum talan um eina tvífalding av ferðaavgjøldinum um seinastu árini, har avgjøldini støðugt eru hækkað.

Í grundgevingini ávarar Høgni Hoydal staðiliga ímóti hesum ætlanum, tí tær fara at elva til stórar trupulleikar fyri ferðafólk, flutnings- og ferðavinnufeløg.

Fólk, sum hava keypt ferðaseðlar kunnu tá rokna við eini eftirrokning og hetta fer at elva til umsiting og ónøgd.

Eisini vísir Høgni Hoydal á, at tað er avlagandi, at danski staturin hækkar avgjøldini fyri flogvølliun í Vágum, samstundis sum tosað verður um javnsettar partar og samstundis sum ætlanir eru um at yvirtaka flogvøllin í Vágum.

**Norðuratlantsbólkurin**

Lesið Sosialin -so eru tit við!